# 9,68 sekund

Amerikanski Tyson Gay, sum er heimsmeistari á 100 metrum, er í stórformi undan olympisku leikunum. Sunnunáttina rann hann 100 metrar upp á 9,68 sekund, og tað hevur eingin gjørt undan honum. Tíðin varð tó ikki góðkend sum heimsmet, tí undanvindurin var ov nógvur. Talan var um úttøkukapping hjá amerikanska landsliðnum, og tað var um reppið, at Gay als ikki kom við á liðið. Í innleiðandi umfarinum tók hann tað nevnliga somikið róligt, at hann bara akkurát vann seg víðari til finaluumfarið.



# Suðuroyingar til DM á langbana

Fýra svimjarar frá SuSvim fóru sunnudagin til Danmarkar har tey skulu luttaka í Danish Open. Tað er Danska meistaraheitiskappingin á langbana. Kappingin ið verður í Gladsaxe byrjar týsdagin 1. juli og heldur áfram til sunnudagin 6. juli. At senda svimjarar uttanlands at kappast er ein liður í støðugu menningini av svimjarum sum SuSvim hevur sett sær fyri, sigur felagi í tíðindaskrivi. Tey 4 eru: Mona Simonsen, Shaila Millum Garðarnar, Malan Vitalis Bærendsen og Pál Joensen. Við svimjarunum er eisini venjarin Jón Bjarnason.



*Húgvan var væl pakkað inn, og tað var ein stór løta, tá Jens Martin opnaði eskjuna, sum hann hevði havt við úr Føroyum*




*Jens Martin sæst her saman við framýsingarkuratorinum, Dr. Michael Fuhr, og savnsstjóranum, Mag. Peter Winhäupl*



*Eina seinastu ferð skuldi húgvan setast á høvdið. Og enn sum áður situr hon væl á høvdinum*



*Áhugin fyri føroyskum fótbólti er framvegis stórur í Eysturríki. Her svarar Jens Martin spurningum frá einum sjónvarpsliði, sum eisini var komið á staðið*



*Sjálvandi ber eisini til at síggja brot frá dystinum, sum ongan tíð verður gloymdur. Hvørki av føroyingum ella eysturríkarum*